gult22 cyan22 magenta22 svart22



# Føroyingar í sterkari kapping

**Føroyingar telva sum aldrin áður, bæði her heima og sanniliga eisini á flatlondum. Í hesum døgum royna fýra føroyingar seg í somu kapping í Holbæk.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Martin Brekká er ein av fýra føroyingum, sum í hesum døgum telva í sterkari kapping í Holbæk*

Sterka opna kappingin, Tage Sørensen Memorial, í Holbæk hevur heili fýra føroysk umboð. Føroya sterkasti telvari John Arni Nilssen, føroyameistarin frá 2000 Flóvin Tór Næs og Brekká beiggjarnir, Martin og Hanus.

John Arni er styrkismettur sum nummar seks meðan Flóvin, Martin og Hanus eru styrkismettur ávíkavist sum nummar 15, 26 og 29 av 32 luttakarum.

Føroyingar hava seinastu árini verið væl umboðaðir í útlendskum kappingum, serliga Flóvin sum herfyri telvaði í kappingum kring alt Evropa. Eisini plaga nógvir at leita sær niður til Danmarkar til stóru summarkappingina Politiken Cup, sum í ár verður í døgunum 16-27. juli. Á www.kbhsu.dk kanst tú tekna teg og eisini síggja luttakaratalið higartil.

John Arni og Hanus hava í mong ár havt búðstað á flatlondum og hava tí eisini sjálvsagt luttikið í nógvum kappingum í sama landi. Serliga stuttligt er at síggja garvaða hvalvíkingin Martin Brekká í uttanlanda kappingum. Hann hevur í mong ár verið í føroysku talvelituna og tað tykist sum hann ongar ætlanir hevur at broyta hesa støðu.

Martin hevur hálvt stig av tveimum møguligum. Hann hevur møtt tveimum væl sterkari telvarum, og er tí úrslitið higartil á góðarli leið. John Arni og Flóvin vunnu báðir fyrsta talvið ímóti lægri rataðum telvarum, meðan taptu báðir seinna talvið. John Arni tapti heldur óvæntað á lægri mótstøðu, men fer hann helst kortini at blanda seg í toppin tá kappingin líður móti endanum. Hanus hevur tapt bæði síni talv, eisini ímóti væl sterkari mótstøðu.

Kappingin verður telvað í døgunum 23 juni - 1. juli. Heimasíðan er http://home15.inet.tele.dk/pmp/skak/tsm/.

### Tvey K´ini í snardysti

Eftir lokna føroyavitjan vendi Kasparov eyguni ímóti Týsklandi, har hann eitt nú skuldi hitta týsk umboð innan mentan. Týski talvheimurin hevur ment seg nógv serliga viðvíkjandi skipan fyri sterkum kappingum, og hesum hevur Kasparov nógvan virðing fyri.

Eftir hesa týsklandstúrin leikti hann tvey snartalv ímóti Kramnik í Moskva. Báðir sótu í sama rúmi, men henda telving bleiv beinleiðis løgd út á netið, har túsindavís av talváhugaðum kundu fylgja við. Kramnik vann tað fyrra og sjálvt um Kasparov royndi í seinna talvinum endaði tað javnt, og tískil vann Kramnik hendan lítla snardyst.

Í Svøriki eydnaðist tað ikki svenska konubrotinum GM Pia Cramling at vinna sterku Sigeman kappingina. Hon bleiv í síðstu løtu yvirhálað av veteranunum Boris Gulko og Jan Timman. Cramling, Sokolov, Radjabov og Wedberg deildu triðja pláss, meðan Curt Hansen fekk eitt skuffandi sjeynda pláss.

Tað verður nógv telvað kring evropa í hesum og nærmastu døgum. Millum annað fara Kramnik og Anand í døgunum 26. juni-1. juli at leika ein lítlan kviktalvsdyst. Allur talvaktivitetur kanst tú finna á www.weekinchess.com.

# Vunnu á Finnlandi

**Føroyska unglingalandsliðið hevur júst tikið lut í NM kappingini, sum hesa ferð varð hildin í Svøríki**

BRIDGE
*Arnbjørn Sivertsen og Bogi Simonsen*

Í døgunum 17. til 22. juni var NM fyri unglingar (U-25) í Trelleborg, Svøríki. Á føroyska liðnum vóru:

Arne Mikkelsen, 23 ár
Magni Jøkladal, 23 ár
Reimund Langgaard, 23 ár
Høgni Vesturklett, 18 ár
Gunnar Mouritsen, 18 ár
NPC Finn Ougaard

Tað eydnaðist liðnum at vinna ein av dystunum - tann móti Finnlandi. Úrslitið varð 17-13 til Føroyar. Bara í tveimum av teimum átta dystunum fingu okkara menn rættiliga oyrini í maskinuna. Í hinum seks dystunum stóðu teir seg væl ella hampuliga væl.

Bara tað, at vit ikki enda á aftasta plássi, er ein hálvur sigur fyri okkum. Tá hugsað verður um, hvussu fáar leikarar í unglingaaldri vit hava, má sigast, at hetta er eitt gott úrslit.

Endaliga støðan í kappingini var henda:

| | |
|---|---|
| 1. Ísland | 188 |
| 2. Noreg 1 | 172 |
| 3. Danmark 1 | 171 |
| 4. Noreg 2 | 161 |
| 5. Svøríki 1 | 138 |
| 6. Finland | 121 |
| 7. Danmark 2 | 100 |
| 8. Føroyar | 91 |
| 9. Svøríki 2 | 84 |

Úrslitini hjá tí føroyska liðnum vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Føroyar - Ísland | 08-22 |
| Føroyar - Danmark 2 | 08-22 |
| Føroyar - Noreg 2 | 02-25 |
| Føroyar - Noreg 1 | 11-19 |
| Føroyar - Finnland | 17-13 |
| Føroyar (yvirsitari) | 18 |
| Føroyar - Danmark 1 | 02-25 |
| Føroyar - Svøríki 2 | 12-18 |
| Føroyar - Svøríki 1 | 13-17 |

Vit skulu síggja, hvussu Magni og Arne meldaðu ein góðan stóraslemm í dystinum móti Noreg 1.



*Føroyska landsliðið, sum júst hevur tikið lut í unglinga-NM*

| | | |
|---|---|---|
| E/NS | | |
| | J109532 | |
| | J873 | |
| | - | |
| | 542 | |
| A6 | | K84 |
| Q4 | | A5 |
| AK5432 | | QJ96 |
| AK3 | | QJ109 |
| | Q7 | |
| | K10962 | |
| | 1087 | |
| | 876 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Magni | | Arne | |
| - | - | 1 kl | pass |
| 1 rú | pass | 1 ut | pass |
| 2 rú | pass | 3 rú | pass |
| 3 hj | pass | 3 ut | pass |
| 4 sp | pass | 5 rú | pass |
| 7 rú | pass | pass | pass |

2 rú var XY-sans. Krav til útgang.
3 hj var Trelde. Spyr um hald og eftir essum.
3 ut vísti hald í hjartara og eitt ess.
4 sp var Beta Trelde, spurdi um hald í spaðara og eftir trumf-frúgv.
5 rú vísti hald í spaðara og trumf-frúgv.

Við helvtina av teimum átta borðunum varð stórislemmur meldaður í hesum spælinum. Mótstøðumenninir hjá okkum meldaðu eisini hendan slemmin, so spælið endaði javnt har.

Vit skulu eisini síggja eitt gott og heppið offurmeld frá dystinum móti Finnlandi. Eitt spennandi spæl, sum kundi farið báðar vegir.

| | | |
|---|---|---|
| V/NS | | |
| | K3 | |
| | K107 | |
| | 10765 | |
| | QJ98 | |
| 1085 | QJ97642 | |
| 852 | 96 | |
| QJ93 | | K |
| A72 | | 1053 |
| | A | |
| | AQJ43 | |
| | A842 | |
| | K64 | |

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| Gunnar | | Høgni | |
| pass | pass | 3 sp | D |
| 4 sp | D | pass | pass |
| pass | | | |

Um mótspælið í góðari tíð spælir kleyvara, kunnu teir taka 7 stikk, og so kostar offurmeldið 800. Men Høgni fekk rútaran góðspældan og kundi kasta tveir kleyvarar til rú Q og J. Sostatt fingu finnar her bara 300 fyri hetta spælið.

Soleiðis gekk meldið við hitt borðið:

| V | N | E | S |
|---|---|---|---|
| | Arne | | Magni |
| pass | pass | 3 sp | 4 hj |
| 4 sp | 5 hj | pass | pass |
| pass | | | |

Magni valdi at melda 4 hj heldur enn at upplýsingardupla. Nú var eitt sindur léttari hjá Arna at melda 5 hj. Um Vestan finnur ein lítlan rútara í útspælinum, fer kontraktin niður. Men tað gjørdi hann ikki, og so kundi Magni taka trumf, avblokera sp A og síðan góðspæla kleyvaran. Mótspælið fekk fyri kl A og eitt stikk í rútara, og Føroyar 650 fyri spælið.

gult23 cyan23 magenta23 svart23




**Starv**

## Lastbilmekanikari til bilverkstaðið

Strandfaraskip Landsins søkja við hesum eftir lastbilamekanikara til bilverkstaðið at byrja skjótast gjørligt.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá bilverkstaðnum**
Høvuðsuppgávan hjá bilverkstaðnum er at umvæla, samskipa og menna tekniska viðlíkahaldið av lastbilum, bussum o.ø. koyriútbúnaði hjá fyritøkuni.

**Aðrar høvuðsuppgávur eru:**
- Tryggja ein støðugan rakstur av koyriútbúnaðinum
- Seta upp viðlíkahaldsmannagongdir- og ætlanir
- Gera ætlanir um størri viðlíkahaldsarbeiði
- Hava dagligt eftirlit við koyriútbúnaðinum, herundir samstarv við Bileftirlitið, verkstøð og aðrar myndugleikar.

Strandfaraskip Landsins hava 15 lastbilar, 10 bussar, 7 vørubilar, 31 viðfestisvognar og annan útbúnað.
Á bilverkstaðnum eru íalt 8 fólk.

**Starvið fevnir um**
Vanligt viðlíkahaldsarbeiði uppá lastbilar, bussar o.a. útbúnað.

**Førleikakrøv**
- Lastbilamekanikari ella tilsvarandi mekaniska útbúgving
- Stóra koyrikortið er ein fyrimunur
- Arbeiða sjálvstøðugt og hava lætt við at samstarva
- Góðan røkjuskap

**Setanartreytir**
Setanartreytir verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið, og er starvið lønt í lønarflokki 3.

**Umsóknir**
Áhugaðir mekanikarar skulu senda umsókn til:

**Strandfaraskip Landsins**
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skulu vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 4. juli 2001, kl. 12.00.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heðin Mortensen, leiðara á bilverkstaðnum tlf. 34 30 00 lokal 146, ella e-post: hem@ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlanda fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*



LANDSVERKFRØÐINGURIN

## Leiðari til havnadeildina

Starvið sum leiðari til havnadeildina hjá stovninum verður við hesum lýst leyst av nýggjum.

Havnadeildin hevur ábyrgdina av málum viðvíkjandi havnum og lendingum, fysiskari planlegging á sjónum, geofysiskum mátingum og øðrum.

**Arbeiðsuppgávur**
Havnadeildin tekur sær av málum viðvíkjandi havnum og lendingum og teim játtanum, sum latnar verða til hesi endamál, fysiskari planlegging á sjónum, hald av ferjulegum, ið landið eigur á Gomlurætt og við Oyrargjógv, og ferjulemmunum á teim kommunalu ferjulegunum o.a., hald av anodum, samstarv við Farvandsvæsenet um avmerkingar, fysisk ráðlegging í sambandi við aling á sjónum og veiting av tænastum til kommunur í sambandi við at reka og halda havnir og lendingar.

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi og helst við royndum innan nøkur av omanfyri nevndu virkisøkjum.

Umsøkjarin skal harumframt hava góð samstarvsevnir. Eisini skal hann hava evni at ganga undan og kunna eggja og halda øðrum til.

Umsøkjari við leiðsluroyndum hevur fyrimun, men er tað tó eingin treyt.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Føroya Verkfrøðingafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, møguligum ummælum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda til

**Landsverkfrøðingin**
Postboks 78, 110 Tórshavn

og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 10. juli 2001. Brævbjálvin eigur at merkjast »Leiðari til havnadeildina«. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes á tel. 31 13 33 (e-postur: oyvindur@lv.fo).



## Dagrøktari søkist

Søkt verður eftir avloysara til dagrøktarskipanina í Skála kommunu, fyri dagrøktarmammu í barnsburðarfarloyvi, at byrja 6. august.

Umsóknir skulu vera kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 13.7.2001.

Nærri fæst at vita frá dagrøktarleiðaranum á

**tlf. 441770 ella 441863**



## Vágs skúli

Søkt verður eftir lærarum til skúlaárið 2001/2002.

• 2 størv fyri lærarar í farloyvi
• 1 parttíðarstarv

Størvini, sum eru tíðaravmarkað skúlaárið 2001/2002 verða sett sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum frá 18.1. til 27.4.

Umsókir við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera skúlanevndini í hendi í seinasta lagi 03.07.2001.

**Vágs skúlanevnd**
v/ Mariannu Eystberg
900 Vágur



**Toll- og Skattstova Føroya Stýrið**

## Afturlatið

Í viku 30 og 31 er afturlatið í Toll- og Skattastýrinum á Argjum.

Tó ber til at ringja á tlf. 352605 ella at senda e-post til: tsasbol@tollskatt.fo

**Toll- og Skattstova Føroya Stýrið**



## Jørð í Sørvági

Um hóskandi boð fæst, er ein gyllin, Norðurtriðingur norðari partur, til sølu.

Áhugaði kunnu ringja á

**tlf. 315371 ella 257478**



## Laborantur

FFV-Vestara Bryggja søkir eftir einum laboranti, at byrja 1. juli 2001.

Umsókn skal sendast til:

**FFV-Vestara Bryggja**
Postboks 218
FO-110 Tórshavn
Att.: Rakul B. Joensen

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at ringja á tlf. 355555.